Bjarni Djurholm, landsstýrismaður:

# – Arbeitt verður við broytingum

**Landsstýrismaðurin í vinnnumálum, Bjarni Djurholm, hevur rúsdrekkamál undir sær, og hann sigur, at tað eru kunngerðir á veg, ið møguliga fara at lætta um tilveruna hjá matstovunum.**

RÚSDREKKALÓGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bjarni Djurholm sigur, at tá ið tað snýr seg um mál, ið hava við rúsdrekkalógina at gera, krevur tað altíð drúgva politiska viðgerð.

### Trupult at handfara

– Tá ið okkurt mál viðvíkjandi rúsdrekkalógini ella kunngerðir í hesum sambandi eru fyri politiskt, er tað altíð nógv uppmerksomheit um tað, og hesi mál eru ógvulga trupul at handfara, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin greiðir tó frá, at broytingaruppskot hava verið til hoyringar, og at svarini upp á hoyringsskrivini eru á veg aftur til vinnumálaráðið. Bjarni Djurholm sigur seg vænta, at málið liggur á hansara borði aftur um ein mánað ella so, og síðani verður tað lagt fram á landsstýrisfundi.

– Hetta er eitt ótrúliga trupult mál, men nakrar av teimum broytingum, sum eru væntandi, eru eitt nú, at tað fer at verða gjørligt hjá eitt nú matstovum at keypa upp á borg, og eisini kann væntast, at stórir kundar fara at fáa mongdaravsláttur í Rúsdrekkasøluni, sigur Bjarni Djurholm.

Sambært landsstýrismanninum er ein trupulleiki á økinum, at ásetingarnar fyri virkseminum hjá Rúsdrekkasøluni eru ógvuliga mótstríðandi. Hann nevnir sum dømi, at stovnurin skal hava eitt ávíst yvirskot, samstundis sum hann skal verða við til at tálma rúsdrekkanýtsluna í Føroyum.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at broytingar eru væntandi, ið hava við sær, at matstovur kunnu keypa upp á borg og fáa mongdaravsláttur í Rúsdrekkasøluni.*
*savnsmynd*

# Gamal kenningur vitjaði

Í gjár var eitt Boeing 737 flogfar hjá Sterling á vitjan í Vágum. Talan er um eitt av gomlu flogførunum hjá Maersk Air, ið fylgdi við, tá ið Maersk Air og Sterling løgdu saman, og flogfarið hevur mangan áður vitjað í Vágum. Flogfarið, OY-API, hevur framvegis gomlu Maersk litirnar, men Sterling stendur á síðuni á tí, sum tað eisini sæst á myndini.

Flogfarið, ið er av slagnum Boeing 737-500, kom úr Aalborg, og tað var danska verjan, ið hevði leigað flogfarið í sambandi við manningarskifti á einum av verjuskipunum.

**tn**




*Tað líkist sær sjálvum, gamla flogfarið hjá Maersk Air, sum nú hoyrir undir Sterling. Flogfarið var á vitjan í Vágum í gjár í sambandi við manningarskifti á einum av donsku verjuskipunum.*
*Mynd: www.floghavn.fo*

# Vág-bingar fáa nummar

**Vágur:** Næstu dagarnir fáa øll hús í Vági sendandi eitt nummar at seta á húsini. Hetta verður gjørt, nú adressuskráin – gøtunøvnini – fyri Vágs kommunu eru góðkend.

Í skrivinum verður upplýst gøtunavn og gøtunummar. Gøtunumrini, ið setast skulu á húsini, verða latin ókeypis, og fólk kunnu, um áhugi er fyri tí, fáa hjálp til at seta tey á húsini.

Eitt kortablað verður eisini sent við, har fólk verða biðin um at skráseta, hvar á matriklinum vatnleiðing, elkaðal, telefonkaðal,kloakkir, rottangi v.m. eru, og síðani senda upplýsingarnar til kommununa.

- Eisini er ætlanin at fara undir at skráseta staðarnøvnini (býlinganøvnini) í Vágs kommunu, soleiðis at hesi kunnu verða varðveitt til eftirtíðina, sigur Vágs Býráð í tíðindaskrivi.

# Roykibann á matstovuni

**Á Hotel Vágum hava tey nú gjørt av, at tað ikki longur skal verða loyvt at roykja á matstovuni á gistingarhúsinum.**

ROYKIBANN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Teir gestir, sum mánadagin leita sær á matstovuna á Hotel Vágum, noyðast at gera sær greitt, at skulu tey festa sær í eftir eina betri máltíð, verður neyðugt at fara út úr matstovuni at gera hetta.

Fólk spurt eftir roykibanni

Kári Hentze, stjóri á Hotel Vágum, sigur, at seinnu árini eru fólk blivin alsamt meiri tilvitað um roykibann á almennum støðum, og alsamt færri hava roykt á matstovuni.

– Fólk hugsa meiri og meiri um roykingina, og tað eru øgiliga fá, sum í dag roykja á matstovuni. Í útlandinum er tað vanligt, at tað ikki er loyvt at roykja á matstovum, og hetta sæst eisini aftur her, tí eingir útlendingar roykja á matstovuni, sigur Kári Hentze.

Stjórin á Hotel Vágum sigur, at seinastu tíðina hava fleiri fólk spurt eftir, um gistingarhúsið fór at seta fullkomið roykiforboð á matstovuni, og nú verður hetta so gjørt.

– Eg vænti ikki, at hetta verður nakar trupulleiki, tí flestu fólk fara sum er út at roykja. Um til dømis skeið er á gistingarhúsinum, so fara skeiðluttakararnir út at roykja í steðgunum. Eingin setur seg á matstovuna at roykja, greiðir Kári Hentze frá.



*Frá mánadegnum av fer tað ikki longur at verða loyvt at roykja á matstovuni á Hotel Vágum*